NÁM

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Postbox 3279,
Tinghúsvegur 7
110 Tórshavn

Dagfesting:
31. oktober 2023
Tygara ref.:

Máltal: 23/21137-3

Viðmerkingar til Uppskot til Løgtingslóg um málskúla fyri føroyskt sum annaðmál við hoyringsfreist 31. oktober 2023.

Nám hevur við áhugað lisið og viðgjørt uppskot til løgtingslóg um málskúla fyri føroyskt sum annaðmál, tað er neyvan ivi um, at gott er at fáa skipaði viðurskifti á økinum, yvirskipað halda vit at nógv av tí, ið stendur í lógaruppskotinum kundi staðið í kunngerð, og lógin eigur at áseta yvirskipaðu karmarnar. Nám hesar annars hesar viðmerkingar til uppskotið.

Til § 1
Mælt verður til at endamálsorðingin verður broytt til:
Eftir reglunum í hesi løgtingslóg verður skipað fyri landsumfatandi undirvísing í føroyskum sum annaðmál fyri vaksin, fyri tilflytarar sum hava annað fyrstamál enn føroyskt.

Til § 2 *stk. 1*
Málskúlin undirvísir sambært námsætlan í føroyskum sum annaðmál. Undirvísingin kann enda við roynd ella prógvtøku sambært lýstari námsætlan, ið landsstýrismaðurin letur gera.
Viðm: Er talan her um tvær ymiskar námsætlanir? Í dag hava vit tvær, eina til børn og eina til vaksin. Er tað hesar hugsað verður um? Setningurin; *eina í føroyskum sum annaðmál og eina, sum landsstýrismaðurin letur gera* er ógreiður. Ásetingar um eftirmeting og prógvtøku eru vanliga í námsætlanum. Aðalráðið skuldi heldur brúkt amboðini útbúgvingarkunngerð, námskipan og námsætlan og síðani leiðbeining til námsætlan. Her tykist ikki greitt hvat hugtakið námsætlan fevnir um.
Harumframt er orðingin **kann enda við roynd ella prógvtøku** ógreið. Endar undirvísingin við eini eftirmeting ella ikki? Er talan um roynd ella prógvtøku?

Til §3 *stk. 3*
Málskúlastjórin skipar fyri royndum og prógvtøkum eftir tørvi hvørja lestrarhálvu og møguliga øðrum prógvtøkum. Galdandi námsætlan verður fylgd. Málskúlastjórin skipar fyri visitatión av næmingum, sum fara undir útbúgving í føroyskum sum annaðmál.
Viðm: Skilt eigur at verða ímillum royndir og prógvtøku. Ein roynd er innanhýsis eftirmeting, sum skúlin skipar fyri, meðan ein prógvtøka er uttanhýsis eftirmeting, sum Prógvstovan skipar og ger uppgávur til.
Orðingin **eftir tørvi hvørja lestrarhálvu og møguliga øðrum prógvtøkum** er ov veik og ógreið. Hvussu ofta kann prógvtøka vera? Og hvørjar aðrar prógvtøkur kann talan vera um? Spyrjast kann eisini um málskúlastjórin

NÁM

eigur at skipa prótøkur? Ásett eigur at vera, at prótøka kann í mesta lagi skipast tvær ferðir um árið, t.d. á vetri og um summarið. Tað má vera púra greitt nær Prógvstovan skal leggja orku til, annars er ikki vist, at peningur er tøkur til arbeiðið.

Til § 3 *stk. 4*
Prógvstovan útvegar stig- og støðuroyndir og alt neyðugt prótøkutilfar og visitatiónstilfar sambært galdandi námsætlan og eftir tørvi, sum málskúlastjórin samskipar. Prógvstovan kann eisini útvega prótøkutilfar í sambandi við undirvísing smbrt. § 2 stk. 3.
Viðm: Her verður sipa til stig- og støðuroyndir, sum eru heiti, ið námsætlanin til vaksin, sum undirvíst verður eftir í dag, brúkar. Vit eiga at fara burtur frá hesum heitum, tí tey ørkymla, og eru als ikki brúkt í skúlaskipanini annars. Aðrastaðni sipar teksturin til royndir og prótøkur (t.d. í §3 *stk. 3*) og eiga vit at halda okkum til tað.
Hvørjum øðrum prótøkutilfari er tørvur á enn støðuroyndum? Hvat merkir **eftir tørvi**? Og hvat er tað málskúlastjórin samskipar her?
Óneyðugt at seta í lóg, at Prógvstovan útvegar prótøkutilfar til undirvísing. Vanligt er, at prótøkutilfar, ið er brúkt, verður lagt í ein uppgávubanka, sum skúlar hava atgongd til og kunnu nýta í sambandi við undirvísing.
Um prótøkutilfar í sambandi við annað undirvísingar- ella útbúgvingarvirksemi skal gerast, verður talan um eyka kostnað fyri Prógvstovuna.

Dagfesting:
31. oktober 2023
Tygara ref.:

Máltal: 23/21137-3

Til § 3 stk. 5 næsta punktum: .
Málskúlastjórin vísir til Undirvísingarstýrið.
Viðm: Hví er tað neyðugt at skipa málskúlan, sum sjálvstøðugan stovn? ælt verður heldur til, at seta ein fulltrúa í fulltíðarstarv í UVS at umsita hesa uppgávuna, og definera so uppgávurnar í UVS út frá tí.

Til §3 *stk. 6*
Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um virki málskúlastjórans um innskriving, visitatión, undirvísing, royndir, sjúkraroynd, endurroynd, umdøming, dispensatión, lestrarvegleiðing, lestrar- og skilhaldsreglur, útbúgvingartíð, setanarviðurskifti hjá starvsfólki, rakstri av málskúlanum annars o.a.
Viðm: Her verða fleiri ting nevnd, sum landsstýrismaðurin skal gera nærri reglur um. Millum annað royndir, sjúkraroynd, endurroynd, umdøming, dispensation. Skal orðið roynd her skiljast sum prótøka? Aftur her er neyðugt at skilja ímillum hvat er ein roynd og hvat er ein prótøka. Mælt verður til, at tað í lógini stendur, at landsstýrismaðurin ásetir karmarnar fyri prótøku og prótøkutíðarskeið í kunngerð, og prótøkukunngerð síðan verður skrivað.

Til § 5 stk. 1
Landsstýrismaðurin setir í starv málskúlastjóra at taka sær av yvirskipaðu fakligu, námsfrøðiligu, fíggjarligu og samskipandi uppgávunum fyri undirvísing sambært hesi løgtingslóg.
Viðm: Sama viðmerking sum til § 3 stk. 5.
Til § 4 stk. 2 annað punkt:

Undirvísingin skal vera skipað sambært hesi løgtingslóg og teimum reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir við heimild í hesi løgtingslóg.
Viðm: Um hetta skal vera kunngerðarheimildin fyri námsætlanini føroyskt sum annaðmál fyri vaksin, sum eisini verður lisin sum ein útbúgvingarkunngerð, verður mælt til at lýsa útbúgvingina við eini kunngerð og gera eitt rundskriv fyri sjálva námsætlanina. Námsætlanir hava tað við sær at skula tillagast oftari enn ein kunngerð, og tí kann skipanin blíva stirvin um námsætlanin verður løgd í kunngerð heldur enn rundskriv. Hetta verður eisini tilskila í § 2 stk. 1. Men í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður mælt til at áseta námsætlanina í kunngerð upp til fleiri ferðir.

Dagfesting:
31. oktober 2023
Tygara ref.:

Máltal: 23/21137-3

Til § 9.
Málskúlin kann krevja gjald fyri undirvísingartilfar (bøkur o.a.), samsvarandi reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir.
Viðm: Ásetingin er ógreið. Í serligu viðmerkingunum til greinina verður tosað um útbúgvingartilboð, her verður tosað um undirvísingartilfar. Tilfarið, ið Nám framleiðir til føroyskt sum annaðmál, liggur uttanfyri hesa kunngerðaráseting.

Til § 9 stk 2.
Í samstarvi við Málskúlan kann kommunali málskúlin umsita gjaldið fyri undirvísingartilfar, sum næmingarnir skulu gjalda.
Viðm: Sama viðmerking sum til § 9 stk. 1. Tað tykist at vera komi bland ímillum útbúgvingartilboð í § 9 stk. 1 og undirvísingartilfar stk. 2

Til §11 og §12
Viðm: Í tveimum førum stendur: kæran skal vera skrivlig og, **har tað ber til**, grundgivin. Her hevði ein orðing sum: *Kæran skal vera skrivlig og hava ítøkiliga grundgeving* verið betur. Harumframt er ein kærufreist á 4 vikur, tá talan er um prógvtøkumál, nógv longri enn á øðrum útbúgvingum, har talan vanliga er um 7 daga kærufreist.
Kærumøguleikar í sambandi við prógvtøku umframt mannagongdir í tí sambandi eiga at verða ásett í eini prógvtøkukunngerð.

Til § 13 stk. 2 Landsstýrismaðurin skal eftir 3 árum, frá tí at løgtingslógin er komin í gildi, leggja fyri Løgtingið frágreiðing um, hvussu lógin hevur roynst, og um hon hevur virkað eftir ætlan.
Viðm: Hetta hevði verið fint, um hetta varð yvirhildið, tíverri svarar hetta ikki til veruleikan. Tað eru fleiri dømir um tað - bara fyri at nevna eitt; kann nevnast lógin um yrkisskeið Ll. nr. 22 frá 2004 um yrkisskeið. Hon er ikki eftirmett enn.

Umframt hesar viðmerkingar til lógargreinarnar hava vit hesar viðmerkingar til
"Almennu viðmerkingarnar".
Í næstseinasta reglubroti á s. 5 stendur at: Tá lógin um Málskúla ikki nevnir CEFR-skipanina, sum galdandi námsætlan fyri vaksin byggir á, so er tað til tess at tryggja, at innan lógarinnar karmar kunnu henda møguligar broytingar, sum verða staðfestar í námsætlan og kunngerð. Nærri reglur um

NÁM
Hoyvíksvegur 72 / FO-100 Tórshavn / Føroyar
Tel + 298 755 150 / nam@nam.fo / www.nam.fo

námsætlan og CEFR-skipanina verða ásettar í kunngerð til lóg um Málskúla fyri føroyskt sum annaðmál.
Viðm: Sama viðmerking sum til § 4 stk. 2 annað punkt.

Í seinasta reglubroti á s. 5 stendur at: Skotið verður upp, Málskúlin fyri føroyskt sum annaðmál kann undirvísa næmingum í fólkaskúlanum frá 12 ára aldri og eldri og sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál. Tað er gjørd námsætlan fyri føroyskt sum annaðmál fyri fólkaskúlan. Um Málskúlin bjóðar undirvísingartilboð fyri fólkaskúlanæmingar 12 ár og eldri, so verður arbeitt sambært hesi námsætlan.
Viðm: Hetta eigur eisini at standa undir serligar viðmerkingar til § 2 stk. 1 næsta punktum. Og vera tilskila fólkaskúlanæmingum, í fólkaskúlahøpi verður tosa um trý stig og ikki 3 FSA útbúgvingar.

Dagfesting:
31. oktober 2023
Tygara ref.:

Máltal: 23/21137-3

"Tørvurin á undirvísing í FSA veksur skjótt"
Á s. 6 næstseinasta reglubrot stendur: "Lógaruppskotið tryggjar møguleikan fyri, at tað eru í minsta lagi tríggjar til fýra kommunalar málskúlaeindir, sum undirvísa sambært lýstari námsætlan, sum í dag byggir á CEFRskipanina, men at talið av eindum kann verða broytt eftir samráðingum millum partarnar, og tá ið tørvur er á tí."

Viðm: Fyrr í viðrmerkingunum var nevnt at námsætlanin til annaðmál fyri fólkaskúlan eisini kundi vera galdandi fyri næmingar 12 ár og eldri - aldursmarkið ella støði hjá næmingunum má skilmarkast greiðari. Tí tað verður tosa hvørt um annað, hetta lógaruppskotið tykist tó leggja størra dentin á FSA fyri vaksin.

"Fíggingin av verandi skipan"
s. 7 punkt 6. uml. 1.4 mió. til Nám/Próvstovu til undirvísingartilfar og próvtilfar og skeiðs- og eftirútbúgvingarvirksemi.

Viðm: Lógaruppskotið leggur upp til munandi øktar uppgávur til Nàm/Próvstovuna. Tí er umráðandi at fíggingin fylgir við, annars kann Próvstovan ikki halda sínar lógarásettu skyldur.

Viðmerkingar til part "1.3 Endamálið við uppskotinum":
"Uppskotið tryggjar harumframt, at øll viðurskifti, sum eiga at verða fyriskipað á einum útbúgvingarstovni verða undir leiðslu málskúlastjórans og landsstýrismansins. Eitt nú setanarviðurskifti hjá lærarum, rættindi næmingsins, undirvísing, og próvtøka, skráseting o.a"

Viðm: Hetta kann gerast ein avbjóðing fyri Undirvísingarstýrið, tí tað tykist ikki sum organisatiónsskipanin er greið. Smbrt grein 3 stk 5 vísir málskúlastjórin til UVS, men landsstýrismaðurin setur hann í starv, hetta kann grugga skipanina. Samstundis heldur Nám, at um musikkskúlaskipanin skal vera fyrimynd, er ikki neyðugt við einum stjóra, allarhægst einum leiðara kanska ikki meira enn einum fulltrúa í fullum starvi, eins og víst er á í viðmerkingunum omanfyri. Nú verður eisini próvtøka blanda uppí virksemi hjá Málskúlastjóranum, t.v.s. at virksemi hjá Próvstovuni onkursvegna skal liggja uttanfyri Próvstovuna.

NÁM
Hoyvíksvegur 72 / FO-100 Tórshavn / Føroyar
Tel + 298 755 150 / nam@nam.fo / www.nam.fo

NÁM

“1.5. Ummæli og ummælisskjal“
“Ummæli: Verður sent skúlum, øllum aðalráðum, Útlendingastovu, Løgmálaráðnum, Pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, UVS, og kommunum og kommunufelagnum til ummælis.”

Viðm: Nám er ikki nevnt sum ummælispartur sjálvt um Prógvstovan, ið liggur undir stjóranum í Námi fleiri ferð er nevnd í uppskotinum.

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar
Til § 1 næsta reglubrot fyrsta punktum :
“Málskúlin fyri føroyskt sum annaðmál er ein sjálvstøðugur stovnur”

Dagfesting:
31. oktober 2023
Tygara ref.:

Máltal: 23/21137-3

Viðm: Tað er sjálvandi ein grundleggjandi politisk avgerð um hetta skal vera ein sjálvstøðugur stovnur. Men í prinsippinum er hetta ein fyrisitingareind og tí er ikki neyðugt at skipa ein sjálvstøðugan stovn, sum víst verður á í viðmerkingunum omanfyri til lógargreinarnar og niðanfyri til serligar viðmerkingar..

Til § 2 stk. 1 s. 15 næsta reglubrot:
“Nærri reglur um námsætlan og CEFR-skipanina verða ásettar í kunngerðini, sum eisini kunnger galdandi námsætlan.”

Viðm: Sama viðmerking sum til § 4 stk. 2 annað punkt.

Til § 3 stk. 5 verður hesin tekstur nýttur.
“Nágreinar, at tað er málskúlastjórin, sum hevur fíggjarliga og fyrisitingarliga ábyrgd av landsumfatandi rakstri Málskúlans.” Í lógaruppskotinum stendur í § 3 stk. 5 næsta punktum: “Málskúlastjórin vísir til Undirvísingarstýrið.”
Víðari stendur í serligum viðmerkingum á s. 19 undir § 4 stk. 3
“Til tess at tryggja, at øll undirvísingartilboðini veita somu dygd og tænastu, hevur landsstýrismaðurin yvirumsjón við virkseminum, og skal málskúlastjórin vísa til landsstýrismannin í undirvísingarmálum.”

Viðm: Serligar viðmerkingar til § 3 stk. 5 og § 4 stk. 3 eru mótsigandi. Kanska er meiningin er gera hesa tilvísingina við delegatión til UVS, eftir at lógaruppskoti er samtykt. Men so er at siga/skriva tað.

Til § 5 stk. 1 “Málskúlastjórin verður staðsettur í Undirvísingarstýrinum, men skal røkja regluligt samband og samstarv við allar málskúlaeindirnar í landinum.”

Viðm: Nú verður málskúlastjórin staðsettur í UVS - hevur stjórin í UVS ongar heimildir yvir stjóranum? Uppgávur hansara eru ásettar í kunngerð, hetta er ikki ein heppin organisatiónskipan.

Vinarliga

Eyðun Gaard, stjóri

NÁM
Hoyvíksvegur 72 / FO-100 Tórshavn / Føroyar
Tel + 298 755 150 / nam@nam.fo / www.nam.fo